

Eugenio Antonielli, leitistjóri hjá ENI her saman við tveimum fyrrverandi føroyskum oljumálaráðharrum á Oljutingi í Havn, Tórbjørn Jacobsen og Bjarna Djurholm

Mynd Jan Müller

## ENI-stjóri:

# Føroyingar kunnu kenna seg tryggar

**TRYGGLEIKI** ENI hevur brúkt stórar upphæddir til tess at endurskoða allar trygdarskipanir umborð á boripallinum.

Jan Müller

– Líka mikið hvussu nógv tað kostar, so vilja vit gera alt fyri, at henda boringin á føroyska landgrunninum skal vera trygg. Tí hava vit eisini brúkt stórar upphæddir til at betra um allar okkara trygdarskipanir, soleiðis at tær geva optimala verju av umhvørvi og fólki. Hetta segði italski leitistjórin hjá oljufelagnum ENI, Eugenio Antonielli á Oljutinginum í Havn í farnu viku.

Hann greiddi teimum hálvthundrað áhoyrarunum frá verkætlanini, sum er vorðin rættiliga nógv dýrari, nú ENI gjørdi av at steðga boringini í umleið ein mánað fyri at betra um og uppgradera trygdarventilin (Blow out Preventer). Hesin skal forða fyri, at gass og olja bráddliga streyma upp úr boriholinum, skuldi har verið eitt óhapp. Eugenio Antonetti helt fyri, at ENI hevur tikið øll hugsandi trygdarfyrilit í tí boringini, sum fer fram á landgrunninum, og tí kunnu føroyingar kenna seg tryggar. Við hesum sipaði hann eisini til nógv umrødda óhappið í Meksikoflógvanum. Við verandi prísum fyri leigu av boripallum kann endurskoðanin av trygdarskipanunum umborð á West Phoenix hava kostað ENI og hinum fýra oljufeløgunum umleið 100 mill. kr. Øll boriverkætlanin er mett at kosta meira enn hálva milliard krónur.

jan@sosialurin.fo

ikki minst basaltið, sum so aftur kann gagna framtíðar boringum.

### Seks mál

Eugenio Antonielli segði, at ENI hevur peikað út seks mál (target) í boriholinum. Teir nærkast einum av hesum og væntandi koma teir heilt á mál miðjan oktober. Hann vísti eisini á stóru oljufundini, Rosebank og Cambo, sum eru gjørd á bretska landgrunninum ikki so langt frá Anne Marie leiðini, har borað verður nú. Jarðfrøðin her er rættiliga meinlík henni í Føroyum.

– Vit hava góð viðurskifti við føroyskar myndugleikar, okkum dáma væl at vera her, fólkið er sera vinarligt, og so sær undirgrundin eisini sera áhugaverd út. Vónandi finna vit kolvetni, sum kann gagna lokala samfelagnum og eisini okkum, sum gera hesa stóru íløguna. ENI sær eisini, at man ger gassfund, tí gass er reinari orkukelda. Italski leitistjórin vísir annars til, at olja longu er funnin í Føroyum og sipar til Marjun fundið. – Sjálvur haldi eg, at oljuídnaðurin eigur at fara aftur til hetta fundið og gera sítt heimaarbeiði og kanna, hví úrslitið varð sum tað bleiv.

### Opinleiki

Vit spurdu ENI stjóran, hvussu tað ber til, at ENI sum fyritøka hevur so ilt við at vera opin og svara spurningum frá fjølmiðlunum, nú tá onnur oljufeløg eru nógv meira opin um teirra virksemi, og nú tað føroyska samfelagið eisini leggur upp tí ein meira opnan dialog millum myndugleikar og íleggjarar. Til tað viðgongur hann, at ENI hevur ein rættiliga restriktivan informationspolitikk. Hann verjir hetta og sigur, at ENI hevur valt bara at siga nakað, tá okkurt er at siga frá.

– Øll oljufeløg hava sín egna politikk, hvussu tey kunna almenningin.

Okkum dáma ikki at tosa ov nógv, men tá vit siga nakað, so skal nakað vera at siga frá, og tá siga vit bara sannleikan.

### Føroysk vinna

Tá hann verður verður gjørdur varugur við, at føroyskt vinnulív ikki er nøgt við politikkin hjá ENI at brúka føroyskar vørur og tænastur svarar italski leitistjórin, at hann er nýggjur á Føroyaøkinum, og kann tí ikki svara fyri tí, sum er farið fram frammanundan, tá ENI boraði sín fyrsta brunn í 2003.

– Eg kann bara vóna, at vit eru betri til at brúka føroyskt vinnulív í dag, enn vit vórðu tá.

jan@sosialurin.fo




– Vónadi gera vit eitt stórt fund á Anne Marie-leiðini, sum minnir ikki sørt um stóru fundini bretsku megin markið, Rosebank og Cambo segði italski leitistjórin á Oljutinginum

Mynd Jan Müller